*–Tað er í lagi, at fólk finnast at stjórnini í sambandi við kríggið*

*Shimon Peres*

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

# ÚTLOND

# Gíslarnir eru á lívi



*Shimon Peres: – Hermenninir eru á lívi.*

**Teir báðir ísraelsku hermenninir, sum vórðu burturfluttir tann 12. juni, eru á lívi. Ísraelska stjórnin krevur at fáa teir alt fyri eitt.**

Tað var burturflytingin, sum fekk Ísrael at leypa á Hizbollah-støðir í Suðurlibanon, men undir krígnum eru teir báðir hermenninir valla tiknir upp á tunguna. Nú kríggið er av, krevur ísrael at fáa menninar beinanvegin.

– Eftir tí, sum vit hava fingið at vita, eru báðir menninir á lívi og hava tað gott, segði ísraelski varaforsætisráðharrin, Shimon Perez, í Washington í gjár.

Í ST-samtyktini, sum gjørdi enda á bardøgunum í Libanon, stendur, at Hizbollah skal lata teir báðar hermenninar leysar alt fyri eitt, men tað er ikki hent enn. Ísraelski uttanríkisráðharrin, Tzip Livni, tulkar tað, sum at Hizbollah hevur brotið avtaluna um vápnahvíld.

– Vit mugu tryggja okkum, at hermenninir verða latnir leysir beinanvegin og treytaleyst. Tað er klárt brot á vápnahvíldaravtaluna, at teir ikki eru komnir aftur enn, sigur hon við Reuters.

### Ágangur

Ísraelska stjórnin hevur verið fyri hørðum ágangi undir krígnum í Libanon, tí fleiri eru misnøgd við, at tað var so torført hjá herinum at basa Hizbollah. Í Washington bleiv Shimon Peres spurdur um hetta.

– Ísrael er eitt demokratiskt land, og slíkar atfinningar eru ein partur av demokratisku skipanini. Tað kemur tí ikki óvart á meg, at fólk finnast at okkum, men eg vænti, at stjórnin fer at klára ágangin, segði varaforsætisráðharrin.

Ísraelska stjórnin hevur longu sett eina nevnd at kanna kríggið í Libanon. Í nevndini eru millum annað tveir fyrrverandi generalar, og teir skulu kanna, um ísraelska herváldið var nóg væl fyrireikað til kríggið við Hizbollah.

### Iran rindar

Í Suðurlibanon er Hizbollah farið undir at rudda og at endurbyggja tað, sum bleiv oyðilagt í teimum ógvusligu ísraelsku loftálopunum. Tað hendir, eftir at Hizbollah-leiðarin, Hassan Nasrallah, hevur sagt, at felagsskapurin fer at endurreisa tey bústaðarhúsini, sum vórðu løgd í oyði undir krígnum, og at felagsskapurin eisini fer at lata fólki pengar fyri húsaleigu tað fyrsta árið. Tá Ísrael bumbaði støðir hjá Hizbollah í 1996, umvældi felagsskapurin umleið 5.000 sethús, og 2.300 bøndur fingu endurgjald fyri mista grøði.

Hizbollah hevur ikki pengar til eitt so umfatandi endurbyggingar- og hjálpararbeiði, men sambært tingliminum Nehme Y. Tohme er tað Iran, sum rindar útreiðslurnar.

– Iran hevur lovað Hizbollah eina óavmarkaða upphædd til arbeiðið, sigur hann við The New York Times.

### Lata ikki vápnini frá sær

Libanska stjórnin samdist í gjár um at senda stjórnarherin til Suðurlibanon at hjálpa ST-hermonnunum, tá teir koma hagar, men stjórnin kundi ikki semjast um at taka vápnini frá Hizbollah.

Ali Hassan Khalil, sum er tjóðartingslimur hjá Hizbollah, sigur við Reuters, at Hizbollah er sinnað at virka fyri friði í Suðurlibanon, og at felagsskapurin er til reiðar at góðtaka eina neyðsemju við stjórnina.

Ein loysn kann vera, at limirnir í Hizbollah sleppa ikki at bera vápn, og at felagsskapurin sleppur ikki at brúka sínar støðir til at skjóta rakettir inn í Ísrael. Afturfyri sleppur felagsskapurin at varðveita sínar vápnagoymslur í Suðurlibanon.

– Tað kemur ikki upp á tal, at vit skulu lata vápnini frá okkum, sigur Ali Hassan Khalil.

# Bumbumenn linari revsing

**Ein av monnunum, sum skipaði fyri bumbuatsóknini á Bali, er latin leysur.**

Í Indonesia er tað siður at veita brotsmonnum grið halgi- og hátíðardagar, og soleiðis var eisini í dag, nú Indonesia heldur sín tjóðardag.

Millum brotsmenninar, sum hesa ferð fingu gagn av hesum siði, vóru fleiri av teimum, sum eru dømdir fyri at hava verið við til at skipa fyri bumbuatsóknini á frítíðaroynni Bali fyri fýra árum síðani. Av teimum 13 monnunum varð ein latin leysur, og hinir 12 fingu fongsulstíðina stytta, skrivar AP.

Avvarandi hjá teimum 202, sum doyðu í atsókníni á Bali, eru misnøgd við avgerðina hjá myndugleikunum.

– Hetta vísir, at Indonesia hevur als ikki skilt bardagan ímóti yvirgangi, sigur avstraliumaðurin Brian Deegan, sum misti sonin í atsókníni.

## STUTT SAGT

### Norskir fiskimenn tjena væl

– Ætlar tú at tjena eina millión um árið, so skalt tú fara til skips.

Tað er tilmælið hjá norska blaðnum Aftenposten, sum vísir til eina kanning, sum blaðið Fiskaren hevu gjørt. Sambært hesari kanningini tjentu 12 prosent av teimum norsku fiskimonnunum og 15 prosent av reiðarunum meiri enn eina millión norskar krónur í fjør. Sama kanning vísir, at meiri enn ein triðingur av fiskimonnunum tjentu millum eina hálva og eina millión.

Tað eru kortini ikki allir, sum eiga fiskifør, ið tjena so nógv, tí tað eru eisini fleiri, sum forvinna minni enn 300.000 krónur um árið.

Í kanningini hjá Fiskaren sæst eisini, at fiskimenn í Suðurnoregi forvinna meiri enn starvsfelagarnir í Norðurnoregi. Ellivu prosent av teimum norðurnorsku fiskimonnunum forvinna meiri enn eina millión krónur um árið, men í Vestlandet og í Trøndelag eru tað 16 prosent, sum fingu meiri enn eina millión inn á lønarkontuna í fjør, skrivar Fiskaren.

### Ein sigur fyri Islam

Andaligi leiðarin í Iran, Ayatollah Khamenei, rósar Hizbollah, tí eftir hansara tykki hevur felagsskapurin prógvað, at tað ber til at geva Ísrael hernaðarliga mótstøðu og at vinna á ísraelska herinum.

Í einum brævi, sum Khamenei hevur skrivað, og sum bleiv lisið upp í iranska sjónvarpinum, stendur, at tað heilaga kríggið í Libanon var ein átrúnaðarligur sigur fyri Islam. Krígið vísti, at tað er ikki talið á hermonnum, herskipum og flogførum, sum er avgerandi í einum kríggi, men heldur trúgvin og tað heilaga kríggið, skrivar Khamenei og rósar leiðaranum í Hizbollah, Hassan Nasrallah, fyri støðufesti og dirvi.

– Tit prógvaðu, at tað ber til at basa Ísrael, skrivar andaligi iranski leiðarin.

Ayatollah Khamenei skrivar eisini, at ísraelska loftálopið á libansku bygdina Quana vísir, at tað er eingin munur á USA og Evropa. Hann hartar eisini amerikanska forsetan, George W. Bush, tí hann kallaði ísraelsku álopini á Libanon sjálvverju.

### Rúsevnabarónur tikin

Amerikanska rúsevnaløgreglan hevur tikið ein tann ringasta rúsevnabrotsmannin í Meksiko, sigur løgmálaráðið í Washington.

Maðurin eitur Javier Arellano Felix og er sambært myndugleikunum oddamaður í einum sera illagitnum rúsevnafelagsskapi, sum eitur Tijuana, og amerikonsku myndugleikarnir vilja vera við, at hann og hansara hava forvunnið sær nógvar pengar burtur úr rúsevnasmugling tvørtur um markið millum Meksiko og USA.

Myndugleikarnir í USA høvdu lovað 30 milliónir krónur í samsýning, um onkur kundi koma við upplýsingum, sum kundu hava við sær, at Javier Arellano Felix bleiv tikin. Løgmálaráðið í Washington sigur, at fleiri av teimum næstu medarbeiðarunum hjá Felix eru eisini tiknir.